

# ÍF á veg fram

*2. deild: HB varð annað vikuskiftið á rað smurt av í Gundadali*

Jákup Mørk

HB-ÍF 0-4 (0-0)

Næstbesta liðið hjá HB var í ringum skørum, tá teir leygardagin skuldi taka móti gestunum úr Fuglafirði.

**Níggju leikarar klárir**
Tosað verður ofta um, at stóru feløgnini hava ta breidd, sum er neyðug fyri at gera seg galdandi í oddinum, men hetta tykist tó ikki vera støðan hjá HB í løtuni.

Sum skilst á lagnum, so vóru bert níggju leikarar tøkir leygarmorgunin, men at enda fingu teir tó fatur á nøkrum leikarum, sum annars hava verið burturi frá fótbóltinum í eina tíð, solieðis at teir í manntalið vóru fullmannaðir, tá dysturin byrjaði.

Talan var tó um eitt rættuliga skert lið. Ein hin týdningarmesti leikarin hjá liðnum, Gunnar Mohr, var nevnliga burturstaddur, so ábyrgdin fyri málskjótingini skuldi ístaðin leggjast á aðrar leikarar.

Tveir av hesum vóru uttan iva Eyðun Samuelsen og rumenski Gigi, sum nú er byrjaður aftur at venja, men hvørgin teirra megnaði at spæla meira enn ein hálvleik.

**Avgjørdu seinna umfarið**
Tað ÍF, sum hevði bóltin hevði meira allan fyrra hálvleik, men tað eydnaðist teimum tó ikki at gera nakrar skreytir móti HB verjuni, sum stóð seg væl fyrstu trý korterini.

Tað mundi tó einamest bara vera ein spurningur um tíð, áðrenn hol varð sett á, og tá fryst Eyðun Rygshamar hevði sett hol á tíðliga í seinna hálvleiki, mistu teir á heimaliðnum trúnna upp á, at talan skuldi gerast um eitt líkinda úrslit.

Jógvan Arnfinn Jacobsen økti til bæði 2 og 3-0, áðrenn Bárður á Lakjuni við einum beinleiðis frísparki kundi staðfesta trygga sigurin við einum beinleiðis frísparki.

**Spurningur um hugburð**
Við sigrinum togaði ÍF seg nakað nærri oddinum, har teir nú eru 3 stig aftan fyri oddaliðini, TB og EB/Streym.

Einki er at ivast í, at fuglfirðingarnir fegnir vilja vinna seg upp aftur í fremstu deildina, men higartil hava avrik teirra verið alt ov óstøðug.

Tað hava tey so sanniliga eisini verið hjá HB, men seinastu tíðina hevur pílurin fyri mesta peikað niðureftir hjá høvuðsstaðarfelagnum.

Ein skuldi annars hildið, at tað ikki skuldi verið nakar trupulleiki hjá einum av størstu feløgunum í landinum at manna tvey lið, men kaldi veruleikin á stigatalvuni sigur nakað annað.

HB er nú bert eitt stig omanfyri KÍ, sum framvegis er á niðasta plássinum, men verður hugburðurin hjá leikarunum ikki broyttur, er vandi fyri at teir detta enn longur niður á stigatalvuna.

Tá leikarar fara á jóansøku, heldur enn at spæla landskappingardyst, er í øllum førum okkurt, sum bendir á, at uppgávurnar ikki verða tiknar í nóg stórum álvara.

**HB-ÍF 0-4 (0-0)**

0-1: Eyðun Rygshamar
0-2: Jógvan Arnfinn Jacobsen
0-3: Jógvan Arnfinn Jacobsen
0-4: Bárður á Lakjuni

# KÍ kiksaði aftur móti NSÍ

*Útisetarnir vóru blindir ferðamenn, og fram móti endanum var nærlagni hjá vertunum størri enn hjá gestunum*



*Aftur hesa ferð vóru Djóni og teir omaná, tá KÍ var mótstøðuliðið*
***Mynd: J. Jacobsen***

Tað kundi tókst soleiðis, eftir at innskifti unglingaspælarin hjá KÍ, Hjalgrím Elttør, hevði javnað til 1–1 (Rógvi Jacobsen lyfti úr vinstru upp um við– og mótstøðuspælarar og til handara stólpa), at spurningurin, sum skuldi svarast síðstu løtuna í góðveðrinum í Runavík, fór at verða, um heimaliðið fór at megna at halda tørn, ella um javnleikin, ella um teir enn eina ferð noyddust at fara tómhentir av vøllinum.

Gongdin hevði verið, at klaksvíkingar trýstu og trýstu – uttan at teir vóru serliga miðvísir og vandamiklir – og tá tað endiliga var eydnast at fáa mál, so hava royndirnar frá sovornum støðum so ofta áður víst, at tað liðið, sum hevur úrslitaliga undanvindin, alíkavæl fær fulla úrtøku.

Soleiðis endaði tað ikki í Runavík. Síðstu løtuna – eftir at KÌ hevði javnað – hekk tað nógv betri saman hjá heimaliðnum. Í veruleikanum var tað soleiðis, at tað var hesa løtuna, at NSÍ vísti besta avrikið. Klaksvíkingar tóktust ikki rættuliga at vita, um teir skuldu leypa á fyri at vinna, ella um teir skuldu spæla fyri at varðveita javnleikin. Støðurnar á vøllinum og harvið eftiransingarnar hjá teimum vóru vánaligar, og skjótu álopini hjá NSÌ vóru nógv vandamiklari, enn royndirnar hjá KÌ at leggja trýst á.

Sigursmálið eina lítla løtu undan leikloki átti jugoslaviski málverjin hjá KÌ við rubb og stubb. Eftir at Heðin á Lakjuni ikki hevði fingið fatur á langari sending fram í vinstra horn, fekk Brynjolvur Nielsen fram í høgra álopsborð hjá NSÌ. Sonni L. Petersen hevði nógv pláss, hann streyk móti baklinjuni, men KÌ tóktist hava tak á flata innlegginum. Málverjin bíðaði eftir bóltinum, men ólukkutíð fyri hann og FM vónirnar hjá KÍ, so sá hann ikki, at Jónstein Petersen, sum í fleiri av undanfarnu dystunum hevur sitið á beinkinum, kom strúkandi, fór framvið málverjanum og setti fótin undir bóltin, sum rullaði í tóma málið.

So var liðugt, NSÌ hevði vunnið stigini, og klaksvíkingar fóru nakkalangir norður aftur.

**Stýrimaðurin helt ikki**
Uppgerðin í Runavík fer ikki at fáa nakra vakurleika virðisløn. Har vóru nógvir høgir bóltar, nógvir langir bóltar og nógvir óneyvir bóltar. Í einari roynd at styrkja um miðvallarspælið, sum ikki hevur verið sannførandi, hevði NSÍ venjarin sett 41 ára gamla Abraham Hansen mitt á. Veteranurin stríddist sum ein úlvur og tóktist hava styrki til at samskipa, men longu tá ein hálvur tími var farin, noyddist Abraham at taka seg av vøllinum orsaka av vøddaskaða í lærinum.

Men hóast NSÍ ikki fekk tamarhald á miðvøllinum, og hóast KÍ stórar partar av tíðini hevði meiri trýst og tiltuskaði sær eina rúgvu av hornaspørkum, so gjørdist tað ongantíð kostnaðarmikið fyri heimaliðið, at miðvallarloysnin fór í fisk, tá bara ein triðingur av tíðini var farin.

Ein orsøk til, at tað gekk væl var, at NSÍ, skjótt eftir at Abraham var farin út, kom á odda. KÍ miðverjan tøvdi í framspælinum, NSÌ fekk tak á, Christian Høgni Jacobsen, sum hevði fingið útsett skurðviðgerðina í Klaksvík til í gjár, kom leysur í vinstru, legði innfyri, og eftir eitt sindur av aftur og fram heilfluktaði Ian Højgaard eitt sindur úr høgru og í málið.

Málið gav NSÌ dirvi og áræði, og sjálvt um KÌ hevði fleiri royndir, so var NSÌ tættast við at fáa mál. Støðurnar vóru vandamiklar bæði eftir fríspark frá Sjúrða Jacobsen, og tá teir í heilt spískum komu innum KÍ málverjan.

**Lupu miðvøllin um**
Ein onnur orsøk til, at NSÌ endaði omaná var, at miðvallarspælið hjá KÍ var út av lagi vánaligt. Marek og Kristian á Lakjuni vóru skaddir, og Arnold Joensen sat á beinkinum allan 1. hálvleik. Ove Nysted og Niclas Niclsen hava ongar royndir sum miðvallarar. Ætlanin tóktist vera, at framspælið skuldi vera í borðunum, og at innleggini skuldu liggja høgt til stóru menninar, men hetta miseydnaðist.

Harley Bertholdsen var ikki so vandamikil, sum hann onkuntíð hevur verið. Tað var týðuligt, at samanspælið við púra anonyma Srecko var ikki av tí slagnum, sum tað plagar at vera við Arnold Joensen, og í hinum borðinum varð John Ryan lítið brúktur. Miðvøllurin var ov stirvin og megnaði ikki at skifta síðu. Og so sigur tað seg sjálvt, at bæði Heðin á Lakjuni og Rógvi Jacobsen vóru minni eyðsýndir, enn teir eiga at vera.

KÍ hevði møguleikar í báðum umførunum. Tað hekk betri saman, tá Arnold Joensen í 2. hálvleiki var komin á miðvøllin, og tað hjálpti eisini, tá Hjalgrím Elttør kom inn í høgra borði. Men tað var ongantíð sannførandi, og tað er ein veruleiki, at miðvallarspælið hjá KÍ ongantíð var av tí slagnum, sum B71 vísti í 2. hálvleiki, tá teir á skálafjarðarstevnuni fingu javnleik og mundu vunnið í Runavík.

Dánial Hansen og Gert Langgaard stríddust nógv á framrættaða miðásinum hjá NSÍ. At teir arbeiddu nógv hevði við sær, at miðverjarnir hjá KÍ vóru strongdir í uppspælinum, og tað hevði eina rúgvu av mistøkum við sær.

Sum 2. hálvleikur leið, kundi tað fara báðar vegir, men eftir at KÍ hevði javnað, sleptu teir takinum, NSÌ tók av, og hóast sigursmálið stóðst av klossutum málverjuspæli, so var tað ikki púra óvæntað.

JH

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Djóni N. Joensen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Abraham Hansen, Dánial Hansen, Ian Højgaard – Christian Høgni Jacobsen, Gert Langgaard, Jónstein Petersen

**KÍ:**
Zoltan Kujundzic – Andrzej Pacek, Jan Andreasen, John Ryan – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Ove Nysted, Niclas Niclasen – Srecko, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni





*Tór-Ingar Akselsen var í serflokki, tá FS Vágar um vikuskiftið sendi B68 heim aftur við einum 3-2 tapi*

# Tór–Ingar er í serflokki

*FSV punkteraði B68 í fyrra umfarinum, tá Jan Dam sat og hugdi at. Í seinna umfarinum var um reppið, at B68 undir leiðslu av landsliðsveteraninum fekk javnað*

FS Vágar-B68 3-2 (3-0)

Fyri aðru ferð á rað fóru vágafólk væl nøgd av sandinum í Sørvági. Teirra lið vann 2–0, tá GÍ vitjaði, og hesa ferð vunnu teir 3–2 móti B68.

Men tað var um reppið, at 3–0 leiðslan, sum FSV hevði olgnað sær í 1. hálvleiki heilt var søplað burtur. B68 kom afturíaftur í 2. hálvleiki, teir minkaðu um munin til 3–2, og tað minti ikki sørt um avrikið hjá Jugoslavia ímóti Slovenia, tá B68 seinnapartin av 2. hálvleiki hevði fingið ein mann útvístan og hevði stóra leikliga yvirvág móti FSV.

**Størri uppgávur bíða**
Vit hava áður fleiri ferðir sagt, at FSV hevur betri lið enn til aftasta plássið og harvið niðurflyting. Hetta var aftur staðfest leygardagin. Serliga í kontraspælinum eru vágamenninir sera vandamiklir. Birgir Joensen og John Johansen í álopinum kunnu seta øllum verjuspælarum grá hár í vangarnar, og álopsparturin verður serliga vandamikil, tí Sonni Johansen ytst í vinstru og Tór–Ingar Akselsen ytst í høgru eru so skjótir.

Serliga eyðsýndur er Tór–Ingar Akselsen. Hann hevur so nógvar dygdir, at tað skal ikki undra, um hann verður næsta spælarin, sum landsliðsvenjarin fer at senda boð eftir. Tór–Ingar minnir ikki sørt um Torkil Nielsen. Uttan at taka nakað frá Torkili, so kundi tað sæð út til, at Tðór–ingar hevur uppaftur størri møguleikar í sær. Hann er skjótur, hann fatar spælið væl, hann er góður við bóltinum, og persónligu eginleikararnir tykjast vera til at røkka langt í fótbólti.

**B68 brølari**
Toftamenn vóru aftanfyri við trimum málum, tá teir fóru at hvíla seg. Jan Dam hevði sitið á beinkinum. Hann loysti eftir steðgin Marlon Jorge av. Jan fór í miðverjuna, og Arnbjørn Danielsen fór fram á miðvøllin at spæla. Útskiftingin broytti fullkomuliga B68 liðið. Heimaliðið hevði lyndi at taka seg aftur á vøllin fyri at verja tryggu leiðsluna – teir tóktust fara ov langt aftur – og B68, sum í 1. hálvleiki hevði havt trupulleikar av, at teir mistu í uppspælinum og vóru yvirspældir av skjótu mótstøðumonnunum, fekk takið á spælinum.

Miðskeiðis í hálvleikinum varð Mannbjørn Nesá rikin av vøllinum, tá hann fyri aðru ferð sá gult, men tað tóktist ikki at nerva toftamenninar, at teir vóru undirmannaðir. Allir arbeiddu fyri hvørjum øðrum, og maðurin við bóltinum hevði sum oftast fleiri møguleikar.

At tað hevði so stóra broyting á B68 spælið og hugburðin við sær, at Jan Dam spældi við í 2. hálvleiki kundi bent á, at tað hevði verið betri, um teir høvdu latið Jan Dam, sum hevur verið skaddur í tvær vikur, spælt frá fyrsta bríksli og so skift hann út, um tað hevði verið neyðugt.

**Mál og møguleikar**
B68 hevði tveir góðar møguleikar beinanvegin. Altíð vandamikli Súni Fríði Johannesen fekk annan, men hann sendi dygst omanfyri málið.

Í staðin fyri leiðslumál til toppliðið, so skoraði heimaliðið tríggjar ferðir í 1. hálvleiki. Eyðfinn Davidsen, sum loysti skadda Hannus Olsen av á miðvøllinum og brúkti allar sínar royndir, stakk snilt inn um verjuna, og John Johansen rann frá verjuni og skoraði hjá Magnusi Poulsen, sum í 2. hálvleiki hevði fleiri góðar bjargingar, tá FSV var í snarálopum.

Tór–Ingar Akselsen átti uppleggið til næsta málið. Hann streyk við stórari ferð ígjøgnum í høgru, skjóti miðvallarin í hinum borðinum, Sonni Johansen, fylgdi við og við handara stólpa umsetti hann flata innleggið til mál. FSV kti til 3–0 eftir fríspark. Toftamenn vóru upptiknir av at gera manngarð, tá Eyðfinn Davidsen beinanvegin stakk fríspark inn um verjuna. Tveir verjuspælarar tøvdu, og so takkaði Sonni Johansen fyri.

Bæði B68 málini komu eftir somu uppskrift. Arnbjørn Danielsen spældi í høgra borð til Øssur Hansen, sum sneiddi ein ella tveir mótstøðumenn av sær, áðrenn hann lyfti innfyri, ar Marcello Marcellino vann luftdystirnar við stóru verjumenninar og stútaði í kassan. Og so skal tað leggjast afturat, at eina ferð í 2. hálvleiki var tað neyðugt hjá Tór–Ingar Akselsen at bjarga á málstrikuni!

JH

**FS Vágar-B68 3-2 (3-0)**
1-0: John Johansen 26.
2-0: Sonni Johansen 29.
3-0: Sonni Johansen 42.
3-1: Marcello 56.
3-2: Marcello 82.

**FS Vágar:**
Remi Mikotionis – Poul Kjartan Thomsen, Darius Magdisauskas, Zilva Zudis, Rimvadis Bakus – Tór–Ingar Akselsen, Eyðfinn Davidsen, Albert Ari Thomassen, Sonni Johansen – John Johansen, Birgir Jørgensen

**B68:**
Magnus Poulsen – Jan Petersen, Mannbjørn Nesá, Arnbjørn Danielsen, Jákup Djurhuus, Øssur Jacobsen – Marlon Jorge, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

# KÍ fekk ov lítið burturúr

*2. deild: Hóast KÍ hevði nógv spæl og upplagdar kjansir, fingu teir ikki meira enn javnleik burtur úr ímóti GÍ*



Jákup Mørk

KÍ-GÍ 1-1 (0-1)

2. deildarliðið hjá KÍ fekk javnleik í evstu løtu, hóast teir høvdu nógv spæl og kjansir í dystinum ímóti GÍ leygardagin

Í so máta líkist KÍ einum botnliði, tí liðið fær ikki nóg stóra úrtøkur burtur úr teimum kjansurm, sum teir fáa.

GÍ kom annars á odda í fyrra hálvleiki, eftir at Omar Guðlaugsson (sum fekk reytt kort eftir dystin) spældi Bárð Heinason leysan. Hann lyfti bóltin upp um KÍ-málverjan og í málið. Fyrsti parturin av dystinum var besta tíðarskeiðið hjá GÍ, tí umframt málið, høvdu teir eisini onkrar aðrar kjansir, men Meinhardt Joensen í KÍ málinum hevði í hvussu so er eina frálíka bjarging.

Men eftir málið tók KÍ alsamt meira yvir. Fyrstu løtuna gekk strilti at spæla seg ígjøgnum GÍ-verjuna, sum varð stýrd av veteraninum Símun Petur Justinussen, men sum dysturin leið komu opini og møguleikarnir.

KÍ hevði besta møguleikan at gera mál, tá teir fingu brotsspark, eftir at Eyðun Klakstein varð feldur. Tomislav Sivic royndi seg úr 11 metrum, men GÍ-málverjin bjargaði skotinum.

**Vildi ikki í málið**
KÍ hevði aðrar royndir í fyrra hálvleiki, og í seinna hálvleiki gjørdust royndir enn fleiri. GÍ dúvaði upp á mótálop, har skjóti Heini Heinason var sentralur, men KÍ-verjan helt tætt seinnu 45 minuttirnar.

KÍ var fleiri ferðir nær við at javna. GÍ-málverjin hevði onkrar bjargingar, og tvær ferðir vóru tað útispælarar, sum bjargaðu á strikuni. Fríðin Ziskason, Johannis Færø og Tomislav Sivic vóru nær við, men tað eydnaðist bara ikki at fáa mál.

Ikki fyrr enn fleiri minuttir inn í yvirtíðina, tá KÍ fekk sítt næsta brotsspark. Hesaferð var tað Fríðin Ziskason, sum varð feldur í brotsteiginum, og vanligi brotssparksskjúttin, Eyðun Klakstein, sendi bóltin í málið av brotssparksblettinum.

Dysturin endaði við javnleiki 1-1, men kjansir vóru til nógv fleiri mál. Serliga vóru tað vertirnir, sum vóru vonbrotnir av javnleikinum, meðan gøtumenn iðraðu seg um, at teir ikki hildu tætt seinastu løtuna eisini.

**KÍ-GÍ 1-1 (0-1)**
0-1: Bárður Heinason
1-1: Eyðun Klakstein (br.)